# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2014

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 1<br>Tíð: 28. januar 2014 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td>Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>28. januar, 17. februar, 17. mars,<br>28. apríl, 26. mai, 23. juni,<br>25. august, 29. september,<br>27. oktober, 24. november,<br>15. desember</td><td>Møttir:<br>Allir býráðslimir</td><td>Ikki á Fundi:</td></tr>
</table>

Borgarstjórin biður um at fáa eitt mál við á skránna aftrat viðv. leigusáttmála millum Vágs kommunu og Sjálvsognarstovnin Pál´s Høll mál nr. 13/00254.

Einmælt samtykt, at taka málið við á skránna.

**1) Mál nr.: 13/00195** Leigusáttmáli millum Faroe Farming og Vágs kommunu

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Havnanevndini um at játta Faroe Farming økið vestan fyri Rock á Oyrunum til leigu.
Fíggjarnevndin hevur á fundi 20. januar einmælt samtykti at taka undir við uppskot til leigusáttmála millum Faroe Farming og Vágs kommunu.
Málið verður lagt fyri býráðið.

**Avgerð:**
Eydis Kjærbo metti seg ógegnigan og var ikki við í viðgerðini av málinum.
Einmælt samtykti.

**2) Mál nr.: 13/00205** Val av umboðum í upptøkunevndina fyri eldrasambýli og ellis- og røktarheim

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram skriv dagfest 29. november 2013 frá Almannaverkinum. Heitt verður á Vágs kommunu saman við hinum kommununum í upptøkuøki 5, at útnevna umboð til upptøkunevndina.
Upp til fýra umboð kunnu vera tilnevnd av kommununum í upptøkuøkjunum i felag.

**Avgerð:**
Vágs býráð samtykti einmælt at mæla til at Dorrit Bech Joensen, kommunulækni verður eitt av umboðunum vegna kommunurnar.

Undirskriva:

Mælt verður somuleiðis til, at Suðuroyar sunnar helvt velur tvey umboð, Vágs kommuna eitt og Sumba, Porkeri og Hov velja eitt umboð, og at Suðuroyar norðara helvt velur tvey umboð.

**3) Mál nr.: 13/00280** Val av umboðum í brúkararáð á Hamragarði og Eldrasambýlinum

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, áheitan frá Almannaverkinum um at velja umboð í brúkararáð á Hamragarði og Eldrasambýlinum sambært kunngerð nr. 99 frá 5. juli 2013 um Røktarheim og Eldrasambýlið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at formaðurin/kvinnan í Sosialu nevnd er umboð vegna Vágs kommunu í báðum brúkararáðum.

**4) Mál nr.: 13/00284** Val av limi og varalimi til barnaverndarnevndina

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram samstarvsavtalu um Suðuroyar Barnaverndartænastu. Sambært §2 stk. 5 verður ein felags barnaverndarnevnd sett umboðandi kommunurnar í samstarvinum. Hvør kommuna velur eitt umboð í nevndina sambært §4, stk. 2 og 3, í lógini.
Sambært lógini §4, stk. 2 er eisini ásett at barnaverndarnevndin skal mannast við í minsta lagi 3 limum og samsvarandi varalimir.

**Avgerð:**
Samtykt við 8 atkvøðum fyri at velja Maud Benjardøgg sum lim, Conrad Gaard atkvøddi ímóti.
Einmælt samtykt, at velja Margreth Augustinussen sum varalim.

**5) Mál nr.: 14/00005** Roknskapur 2013 og fíggjarætlan 2015 fyri Vágs bókasavn

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram Roknskap 2013 og fíggjarætlan 2015 fyri Vágs bókasavn. Roknskapur og fíggjarætlan skal góðkennast av Vágs býráð og sendast Søvnum Landsins innan 31. januar 2014.

**Avgerð:**
Góðkent av Vágs Býráð.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 14/00013** Sáttmáli millum Vágs kommunu og SSL januar 2014

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram sáttmála millum Vágs kommunu og SSL januar 2014.
Sáttmálin er treytaður av at Fíggjarnevndin góðkennir hann.
Av tí at hetta ikki var klárt til fund hjá Fíggjarnevndini í januar, verður hann nú lagdur fyri býráðið til góðkenningar.

**Avgerð:**
Conrad Gaard metti seg ógegnigan og var ikki við í viðgerðini.
Góðkent av Vágs Býráð.

**7) Mál nr.: 14/00016** Sundurbýtið av matr. nr. 479

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn frá P/F Vágs Timburhandli um at býta matr. nr. 479 sundur í 4 lutir.
Tekniska nevnd hevur ikki viðgjørt málið. Tekniski leiðarin vísir á, at sambært byggisamtyktini eru støddirnar á lutunum hóskandi til ætlaðu byggingina, sambært teimum upplýsingum hann hevur fingið.
Býráðið skal við- ella frámæla sundurbýti.

**Avgerð:**
Einmælt samtykti at viðmæla sundurbýti.

**8) Mál nr.: 13/00254** Sáttmáli millum Vágs kommunu og Sjálvsognarstovnin Pál´s Høll

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini, sum á fundi 28. januar 2014, samtykti at taka undir við uppskot til leigusáttmálanum og leggja hann fyri býráðið.

**Avgerð:**
Dennis Holm metti seg ógegnigan og var ikki við í viðgerðini. Eydis Kjærbo, varaborgarstjóri leiddi fundin.

Einmælt samtykt at góðkenna leigusáttmálan.

Undirskriva: